# Dømdir fyri morð

Tveir bretar vórðu í gjár dømdir fyri at hava beint fyri tveimum fronskum studentum í juni í fjør. Rætturin kom til ta niðurstøðu, at Dano Somex og Nigel Farmer brutu inn til teir báðar 23 ára gomlu fronsku studentarnar Laurent Bonomo og Gabriel Ferez í íbúð teirra har suðuri í London við tí fyri eyga at taka pengarnar frá teimum. Í úrskurðinum stendur, at bretarnir bundu teir báðar fransmenninar á hond og føt og myrdu teir síðani. Læknakanningar staðfestu, at teir báðir menninir vórðu stungnir meiri enn 240 ferðir.



# Juncker sleppir einum starvi

Tey seinastu 14 árini hevur Jean-Claude Juncker verið forsætisráðharri og tey seinastu 20 árini fíggjarmálaráðharri í Luksenburg, men nú ætlar hann sær at leggja starvið sum fíggjarmálaráðharri frá sær, um flokkur hansara vinnur tjóðartingsvalið, sum verður sunnudagin. Hinvegin hevur Jean-Claude Juncker ongar ætlanir um at gevast í starvinum sum formaður í tí sokallaða evrubólkinum, ið umfatar tey 16 londini, sum hava evruna sum gjaldoyra. Eygleiðarar halda, at Juncker sleppir fíggjarmálaráðnum, tí Luksenburg hevur verið fyri hvøssum atfinningum fyri at hjálpa útlendingum at fjala pengar undan skattavaldinum.



# Vilja ikki av við bygdarhúsið

**Enn hava strandingar ikki tikið nøkur ítøkilig stig í royndini at varðveita bygdarhúsið sum verandi ogn hjá kommununi, sum annars hevur boðið Heimamissiónini í bygdini at býta húsið um við gamla missiónshúsið. Og tó. Ein profilur er stovnaður á Facebook, har fólk, ið mótmæla ætlanunum hjá kommununi, kunnu tilmelda seg og soleiðis mótmæla ætlanunum**

STRENDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað hevur fingið øði í fólk, at Sjóvar kommuna, sum eigur bygdarhúsið á Strondum, ætlar at lata Heimamissiónini í bygdini húsið afturfyri, at kommunan yvirtekur gamla missiónshúsið í bygdini.

Bygdarhúsið á Strondum, sum er bygt fyri umleið 30 árum síðan, er eitt stórt og gott hús við ørgrynnu av møguleikum, meðan missiónshúsið er eitt gamalt hús í tveimum hæddum, sum er bygt miðskeiðis í triatiárunum.

Orsøkin til, at Sjóvar kommuna eftir øllum at døma vil fremja umbýti er ivaleyst, at bygdarhúsið hevur verið rikið við halli, sum í fjør var einar 450.000 krónur.

Kommunan, sum eigur húsið, hevur havt ein dagligan leiðara, og seinastu 3-4 árini hevur leiðarin verið Meinhild Harrysdóttir. Hon røkir ikki hetta starv longur, tí kommunan hevur sagt hana upp – frá 1. juni í ár at rokna.

Sjóvar kommuna er í løtuni í holt við at fremja uppíbygging av nýggjum skúla, og sambært vælvitandi keldum væntar kommunan, sum annars er væl fyri fíggjarliga, at 2009 kemur at geva eitt hall í ársroknskapinum upp á einar 14 miljónir krónur.

Hetta er so eisini ein orsøk til, at leitað verður við lykt eftir skerjingum á útreiðslusíðuni.

Hóast nógv verður tosað á Strondum og í kommununi annars um ætlaninar hjá kommunustýrislimunum, hava fólk ikki tikið nøkur ítøkilig stig fyri at fáa Sjóvar kommunu at broyta ætlan um umbýti.

Um dagarnar er tó ein profilur stovnaður á Facebook, har fólk, ið vilja standa saman um, at bygdarhúsið verður varðveitt í verandi líki, kunnu tilmelda seg.

### Nógvir møguleikar

Bygdarhúsið á Strondum man teljast millum tey elstu av teimum nýggjaru húsunum, sum bygd vórðu í sínari tíð til ymiskt mentanarligt virksemi kring landið.

Gjøgnum árini hava nógv ymiskt tiltøk verið í húsinum, og seinastu árini hevur húsið verið karmur um kafeteria, sum hevur verið opin hvønn dag, eins og nýtt fitnessentur hevur verið í kjallaranum. Tað er Strálan, sum hevur leigað hendan partin av húsinum til venjingar, og tað er eisini Strálan, sum hevur útvegað sær venjingaramboðini.

Sum skilst á Strondum, hevur fitnessentrið verið væl vitjað, og fólk hava verið sera fegin um henda møguleika.

Dagligi leiðarin hevur staðið fyri rakstrinum av kafeteria, sum partur av hesum starvi.

Flestu ervi í bygdini hava verið í bygdarhúsinum, eins og nøkur brúdleyp eisini hava verið hildin har.

Í sínari tíð vóru nógv dansitiltøk í bygdarhúsinum, men hesi hava verið nógv færri seinnu árini. Tó hava slík tiltøk verið, tá stevnur og høgtíðir eru.

Eitt umtókt tiltak, sum húsið í seinastuni eisini hevur verið brúkt til, er sonevnd bygdakviss, men seinasta kvissin av hesum slag varð hildin í Statoil hóskvøldið.

Fólk í Sjóvar kommunu halda, at nógvir ónýttir møguleikar liggja í hesum húsi – ikki minst møguleikar av mentunarligum slagi, sum tey halda, at nógv meira kundi verið gjørt burtur úr.

- Tað er kanska ikki altíð so lætt at "umseta" mentan til pening, men við fleiri tiltøkum av ymiskum slagi og einum lítlum gjaldi fyri luttøku, høvdu enn fleiri tiltøk avgjørt gjørt mun á inntøkusíðuni.

### Kaldar føtur

Líkt er til, at umboðini í Sjóvar kommunu ikki høvdu væntað, at fólk fóru at seta seg so hart upp ímóti samtyktini um umbýti.

Í samrøðu við aðrar fjølmiðlar hevur borgarstjórin, Arthur Johansen, soleiðis sagt, at enn er seinasta orðið ikki sagt í hesum máli.

Hetta kundi bent á, at kommunan fer at umhugsa sína avgerð av nýggjum, áðrenn endalig avtala verður gjørd um umbýti.

Heimamissiónin í kommununi hevur arbeitt við ætlanum um at byggja nýtt missiónshús fyri fleiri miljónir, og tá kommunan beyð teimum húsið í býti við gamla missiónshúsið, takkaði missiónin sjálvandi ja.

Nú er so líkt til, at seinasta orðið ikki er sagt í hesum máli.

# Enn er einki samtykt í Sjóvar kommunu

**Artur Johansen, borgarstjóri, sigur, at málið um framtíðarætlanir við bygdarhúsinum er til viðgerðar í trivnaðarnevndini, og har verða nógvir ymiskir møguleikar viðgjørdir**

STRENDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sambært borgarstjóranum í Sjóvar kommunu, Arturi Johansen, er eingin endalig avgerð tikin í kommununi enn um lagnuna hjá bygdarhúsinum.

- Málið um framtíðarætlanir við húsinum er til viðgerðar í trivnaðarnevndini, og tað er ikki lagt fyri bygdaráðið til støðutakan enn. Trivnaðarnevndin er heldur ikki komin til nakra endaliga niðurstøðu.

Borgarstjórin er tó avgjørdur, tá hann sigur, at neyðugt er at fáa skilagóðan rakstur í bygdarhúsið, um tað skal rekast sum partur av virkseminum hjá kommununi.

- Vit hava havt ymiskar skipanir við húsinum gjøgnum árini, og tað kann væl ikki vera ætlanin, at tað einasta, vit regluliga kunnu bjóða í hesum húsi, er ein grillbarr, sum hann tekur til.

Hann heldur, at fólk í kommununi kundu havt "bakkað" húsið betri upp gjøgnum árini, um tey eru so fegin um at varðveita bygdarhúsið sum framhaldandi ogn hjá kommununi.

Artur Johansen sigur, at Sjóvar kommuna hevur spurt seg fyri hjá stýrinum fyri Heimamissiónina, um áhugi er fyri møguligum umbýti, men longur er málið ikki komið.

- Sum áður sagt, er eingin avgerð tikin enn, hvørki í trivnaðarnevndini hjá kommununi, ei heldur í bygdaráðnum, leggur borgarstjórin dent á.